## Illveður í Grønlandi

Tað var rættiligt illveður summastaðni í Vesturgrønlandi um vikuskiftið, og sunnunáttina var harðført á leiðini millum Sisimiut og Paamiut, sigur útvarpið í Nuuk. Í Manitsoq slitu tveir útróðrarbátar og róku á ein trolara, sum eisini lá við bryggju, men stórvegis skaði stóðst ikki av tí, burtursæð frá at trolarin fekk nakrar buglur. Í Nuuk var nógvur vindur, og har kærdi løgreglan seg um, at byggitilfar lá leyst og fór á flog í tí nógva vindinum.



*Tað var harðført nógvastaðni í Vesturgrønlandi um vikuskiftið (Mynd: KNR)*



*Edmund Joensen og Anders Fogh hava umrøtt politisk mál, men komu ikki inn á smálutir*

# 90. maðurin vitjaði forsætisráðharran

**Edmund Joensen var í gjár inni hjá Anders Fogh Rasmussen og greiddi honum frá ætlanum sínum**

POLITIKKUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*
*Myndir: Simun Joannessarson*

Anders Fogh Rasmussen brúkti dagin í gjár til at hitta umboð fyri allar flokkar í Fólkatinginum, og millum teirra, sum fingu eina løtu saman við forsætisráðharranum, var Edmund Joensen.

Edmund Joensen sigur, at hann greiddi forsætisráðharranum frá, hvussu hann ætlar sær at arbeiða í Fólkatinginum. Sum limur í tingbólkinum hjá Vinstra fær hann skrivara frá flokkinum, men harumframt ætlar hann at hava ein ella kanska fleiri føroyingar at hjálpa sær við tí føroyska partinum av arbeiðinum. Sum limur í tingbólkinum hjá Vinstra fær Edmund Joensen sess í tingnevndum vegna flokkin, og á fundinum í gjár kunnaði hann forsætisráðharran um, hvørjar nevndarsessir hann kundi hugsað sær.

Á fundinum umrøddu teir báðir eisini ymisk politisk viðurskifti, men Edmund Joensen sigur, at teir komu ikki inn á nakrar smálutir, tí stjórnin er ikki komin upp á pláss enn.

- Men hann kann kenna seg tryggan við tær sum 90. manni?

- Tann støðan er ikki broytt síðani valkvøldið.

Edmund Joensen fer til setanina, tá nývalda Fólkatingið verður sett, og tá nevndirnar skulu veljast. So fer hann í farloyvi frá Fólkatinginum, so hann kann røkja starvið sum løgtingsformaður hetta til løgtingsvalið. Ímeðan røkir varamaðurin Kaj Leo Johannesen sessin í Fólkatinginum.



*Nývaldi føroyski fólkatingsmaðurin hevur kunnað danska forsætisráðharran um, hvørja nevndarsessir hann kundi hugsað sær*